

# FØRARI TIL BETONGPUMPUBIL AT ARBEIÐA 2+1

J & K Betong søkir eftir bilførara til betongblandibil.
Talan er um krevjandi arbeiði og roknast kann við nógvari yvirtíð. Tí bjóða vit møguleikan at arbeiða sum bilførari í tvær vikur og síðani hava frí ella arbeiða annað - minni krevjandi - arbeiði hjá J & K í eina viku.

Tann, ið settur verður, kann byrja beinanvegin, men vit eru tilreiðar at bíða eftir rætta persóninum.

Løn sambært avtalu.

Sendið umsóknina til adressuna niðanfyri, stílað til Arngrim Arngrimsson, blandimeistara, í seinasta lagi 15. juli. Spurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast Arngrími á tel. 585025

J & K Betong

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: betong@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25


# Fyrsti fleygadagur

**Syftunsøka er í dag, og tað er fyrsti dagur, at menn fleyga lunda. Men lítið hevur verið til av fugli seinastu árini**



*Siftunsøkudagur er fyrsti fleygadagur á árinum*

LUNDAFLEYG
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Seinastu árini hevur verið ógvuliga lítið til av lunda. Skilið hevur verið tað sama um alt landið.

Kortini halda menn, at tað sær hedur frægari út í ár, men Jens Kjeld Jensen, fuglafrøðingur í Nólsoy, metir tó, at fuglurin er komin einar fjúrtan dagar ov seint.

Tað er sama støðan kring landið. Úti í Lítlu Dímun var nakað av fugli, og úti í Nólsoy sær eisini heldur frægari út í ár. Men lítið er at síggja av sildbera, og tað er ringt tekin.

Norðanífrá er einki frætt um fugl. Eftir Jóansøku plaga menn vanliga at fleyga dimmilunda, men sum skilt hevur eingin verið og royntí ár. Men neyvan er nakað øðrvísi har norðuri enn í restini av landinum.

Einki er frætt úr Skúvoy ella Mykinesi, men roknast má við, at støðan er tann sama allastaðni.

Vanliga er nógvur fuglur at fáa, og Settorva á Viðareiði og Mykines eru tiltikin fleygapláss. Eisini úti í Skúvoy plaga menn at fleyga lunda, eins og hvalbingar vanliga eru úti í Lítlu Dímun nakrar dagar um árið.

Úti í Tindhólmi eru nakrir fleygasessir, og har plaga menn eisini at fáa væl av lunda. Í Nólsoy e4r oyggin býtt sundur í tvey soleiðis, at ytri helmingur av haganum eigur Urðina annaðhvørt ár, meðan heimari partur eigur hana annaðhvørt ár.

Burtursæð frá hesum støðum verður ikki nógv gjørt við at fleyga lunda aðrastaðni.

Vónandi verður frægari við lunda komandi árini. Lítið er komið undan seinastu árini, so tað er fyri tað mesta gamal lundi, ið fleygast. Og tað plagdi ikki at vera gott tekin.


STARVSLÝSING

## Vakið eyga við vitum og havnum?

Hevur tú dirvi til at bjóða tær sjálvum av, og kundi tað hugsast, at vitar og havnir í tínum hugaheimi eru forvitnislig og spennandi økir at fara í holt við, so kunnu vit bjóða tær øðrvísi royndir í einum sera áhugaverdum og avbjóðandi starvi á havnadeildini hjá Landsverki.

Høvuðsarbeiðsøkið
Uppgávur, sum tú í høvuðsheitum fært ábyrgdina av:
- rakstur og eftirlit við vitum og innsiglingarljósum
- myndugleikauppgávur og eftirlit í sambandi við ISPS
- eftirlit við og ábyrgd av okkara rakstri av landshavnum, ferjulegum, lendingum,og afløgubryggjum

Førleikakrøv
Tú ert útbúgvin skipsførari, maskinmeistari, verkfrøðingur ella líknandi.

Vit vilja røkka best møguligum úrslitum og leggja tí stóran dent á góðar persónligar eginleikar, at tú arbeiðir sjálvstøðugt, er skyldurøkin, hevur góð samstarvsevnir, dugir at skipa títt arbeiðsøki og geva títt íkast til menning av arbeiðsplássinum.

Setanarviðurskifti
Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreist
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til lv@lv.fo ella til Landsverk, postsmoga 78, 110 Tórshavn, og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 9. juli. Merk umsóknina „Starvsfólk til havnadeildina“ og nevn í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina. Umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ewald Kjølbro, deildarleiðara á havnadeildini, á fartel. 540 861 ella á ek@lv.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvallamál, herundir tyrlupallar.*



Svend Krosstein P/F

## Skrivstovulærlingur søkist

Kundi tú hugsa tær eina framtíð innan skrivstovuyrkið?

Vit hava pláss fyri einum skrivstovulærlingi (m/k) í fyritøku okkara.

Vit kunnu bjóða tær:

- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu í støðugari menning, har tú gerst partur av einum góðum toymi og har arbeiðsandin er av teim bestu.
- Tryggar arbeiðsumstøður.
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning.

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávikavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri til tíðir at arbeiða undir trýsti.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosað við Anniku Krosstein ella Harald Eirikstoft.

Umsóknarfreistin er 10. juli 2007.

Er hetta nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn saman við prógvum og ummælum til:

P/F Svend Krosstein
Postboks 3229
FO-110 Tórshavn
Viðm.: Lærupláss

P/F Svend Krosstein er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 20 fólk í fulltíðarstarvi. P/F Svend Krosstein er einasta HVS-heilsøla í Føroyum og hevur harafturat størsta HVS-handil í landinum. Vit selja alt tilfar til vatnveitingar, hitaverk, sanitet og ventilatión. Eisini selja vit byrsur, patrónir, fiskireiðskap og annað.

TEAM85